## Pengar burtur úr góðum hugskotum



*Bárður Nielsen uttan fyri London Stock Exchange*

ONGLANDSVITJAN
*Jan Müller*

Tað man vera rár hending, at føroyingar støkka inn á gólvið á tí risastóra virðisbrævamarknaðinum í London »London Stock Exchange«. Og uppaftur meira sjáldsamt, at ein delegatión við fíggjarmálaráðharra og 20 av ovastu toppunum í føroyskum vinnulívi og fíggjarheiminum bankar á dyrnar í Paternoster Square nr. 10 í sjálvum hjartanum í London, beint við síðuna av St. Paul's Cathedral.

Tað hendi so mikudagin 18. mai 2005. Endamálið við hesi vitjan var fyrst og fremst at kunna seg við viðurskiftini á virðisbrævamarknaðinum og samstundis at kunna seg um Føroyar og møguleikarnar at gera íløgur har.

- Her fekst tú eina fatan av, hvussu undarligur pengar eru. Tað er ikki nakar, sum sigur, at tú skalt hava nakað ítøkiligt at vísa á ella eina vøru at selja. Hevur tú eitt gott hugskot og eina ætlan fyri framtíðini, so kanst tú væl fáa pengar burtur úr tí, sigur Bárður Nielsen við Sosialin.

Hann ivast ikki í, at hann kemur aftur til Føroyar við nógvum góðum í skjáttuni. Vitan, hugskotum og minst kontaktum frá ferð síni til London og oynna Man.

# Føroyar læra av Man

**- At fjøltátta búskapin. Men vit kunnu ikki uttan víðari kopiera teirra skipan, tí so tætt samskifti er millum politikk og vinnulív, sigur Bárður Nielsen, júst afturkomin av vitjan á oynni Man**

ONGLANDSVITJAN
*Jan Müller*

**London:** 13 ár eftir at Bárður Nielsen sum næmingur á Handilsskúlanum var á lestrarferð á forkunnugu oynni Man, vitjaði hann nú aftur á oynni. Hesaferð tó sum landsstýrismaður í fíggjarmálum.

Týsdagin vitjaði Bárður Nielsen saman við aðalstjórunum í Fíggjarmálaráðnum og Vinnumálaráðnum á Isle of Man. Serstakliga fyri at fáa innlit í, hvussu tað hevur eydnast Man-búgvunum at fjøltátta og laga búskapin til nýggjar avbjóðingar.

- Tað var ótrúliga áhugavert at síggja, hvussu væl tey hava klárað at fjøltátta sín búskap. Frá tí tey fóru frá at vera eitt sjó- og fiskivinnusamfelag og eisini við ferðavinnu, til at byggja samfelagið á banka- og tryggingarvirksemi.

Nú er tað virksermið so stórt, at tað ber ikki til at fjøltátta tað meira. Og tí eru manbúgvar nú farnir inn í filmsídnaðin, og teir liggja alla tíðina framvið at finna nýggjar vinnur.

Bárður Nielsen sigur, at tað sjálvandi kunnu vit læra av teimum, men ikki uttan víðari, tí umstøðurnar eru so ymiskar.



*Bárður Nielsen saman við Petur Alberg Lamhauge og Arna Poulsen á vitjan hjá vinnumálaráðharranum á Man*

Eitt nú er sera tætt samskifti millum vinnuna og politiskar avgerðir.

- Sambært tí politisku skipan vit hava í Føroyum í dag, so hevði ikki borið so væl til at kopierað Manmodellið uttan víðari. Vit royna at hava greiðan skilna millum politikk og vinnulív, og tað er ikki í samsvar við tað, sum hendir á Man, har tey ikki eru bangin fyri at hava tætt samskifti við vinnuna. Har stuðlar politiska skipanin vinnulívinum peningaliga og við at fáa nýggja vitan til vega.

Nú Bárður Nielsen vitjar aftur á oynni sum politikkari viðgongur hann, at málini man setti sær í 70'unum, tá støðan ikki var so góð - nevnliga at fjøltátta búskapin - eru rokkin.

- Eg trúgvi, at tað er her, føroyingar hava nakað at læra. At vera eins málrættaðir sum Man-búgvar. Men teirra politiska skipan liggur so langt frá okkara, at tað verður ringt at kopiera nakað beinleiðis frá teimum.

- Man virkar tá meira sum eitt forrætningsministerium enn nakað annað.

## Nøgdur og opin

Bárður Nielsen, fíggjarmálaráðharri, er nú heima aftur á klettunum úti í Norðuratlantshavi eftir sína fyrstu kanningarferð uttanlands, har leiðin gekk til London og oynna Man í írska havinum.

Tað er ein nøgdur og meira opin landsstýrismaður, sum fer til arbeiðis aftur í »Albert Hall« fíggjarmálaráðnum nú mánadagin.

- Nøgdur - tí hann heldur seg hava fingið sera nógv burtur úr hesi veruligu fyrstu arbeiðsferðgini uttanlands.
- Meira opin - tí hann sær nú betur enn áður møguleikarnar hjá Føroyum og føroyskum vinnulívi at gera seg galdandi á altjóða fíggjarmarknaðinum.

# Menningardagur í Suðuroy

**Verkstovur á Hotel Øravík 2. juni 2005**

MENNING

Á Suðuroyar-ráðstevnuni, sum varð hildin í Øravík 25. januar, beyð Føroya Tele sær til at skipa fyri eini verkætlan, sum skuldi hava til endamáls at kanna møguleikarnar fyri at skapa arbeiðspláss í Suðuroy, sum eitt samstarv millum nýggjar vitanargrundaðar vinnur og meira siðbundið lokalt vinnulív. Í samráð við vinnulívsfólk varð eitt hugskot um serliga framkomna aling brúkt sum dømi á ráðstevnuni.

Vikuna eftir ráðstevnuna skipaði Føroya Tele í samstarv við Suðuroyar Sparikassa ein arbeiðsbólk, sum hevði til endamáls at fáa skapt gott samband millum vinnulív í Suðuroy og aðrar viðkomandi partar av føroyska samfelagnum. Arbeiðsbólkurin skuldi eisini kanna nágreiniligari møguleikarnar fyri at skipa framkomna aling í Suðuroy, men eisini at leggja fram onnur alternativ hugskot.

Arbeiðsbólkurin hevur arbeitt við sjey hugskotum og møguligum verkætlanum, sum verða mett at kunna skapa arbeiðspláss í Suðuroy og kunna marknaðarføra oynna á ein konstruktivan hátt.

Ein ætlan er longu komin so væl áleiðis, at partaløg eru gjørd, og arbeitt verður við fígging. Hendan ætlan er tí í løtuni loynilig, til greitt er, um hon kann gerast veruleiki. Í einum øðrum føri hava partarnir eisini funnið saman.

Eftir er nú at fáa greiðu á, hvørjar av hinum verkætlanunum tað ber til at finna teir røttu samstarvspartarnar til, og um til ber at finna fígging.

Arbeiðsbólkurin leggur fram úrslit síni á einum menningardegi á Hotel Øravík hósdagin 2. juni. Fyrrapartin á degnum verða verkætlanirnar lýstar, meðan seinnaparturin verður brúktur í ymsum verkstovum, sum hava til endamáls at finna møguligar samstarvspartar.

Dagurin endar við framløgum frá hesum verkstovum.

Kostnaðurin fyri at taka lut á temadegnum er kr. 150,-. Neyðugt er at tekna seg í seinasta lagi mánadagin 30. mai kl. 16 hjá Føroya Tele - tlf. 303003 ella 303013 ella hjá Suðuroyar Sparikassa - tlf. 359883. Eisini ber til at tekna seg um teldupost: ado@ft.fo ella liv@sparsu.fo

Sí eisini lýsing á síðu 54.